# Undirskriftir savnaðar fyri skúla í Hovi

**Fríggjakvøldið handaðu tveir miðnámsskúlanæmingar borgarstjóranum í Vági 507 undirskriftir. Hesi 507 hava skrivað undir eina áheitan um at flyta Miðnámsskúlan úr Vági til Hovs. Nú fara tey at savna fleiri undirskriftir**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Sunniva Mortensen, høgrumegin, og Ingibjørg Thomsen, handaðu fríggjakvøldið borgarstjóranum í Vági, Jógvani Krosslá, 507 undirskriftir frá fólki, sum vilja miðnámsskúlan fluttan í ein skúladepil í Hovi*

*Mynd; D. Olsen*

Miðnámsskúlanæmingar í Vági hava savnað undirskriftir fyri at flyta Miðnámsskúlan í Vági til Hovs. Hetta hendir í kjalarvørrinum av fundinum millum landsstýrið og Vágs Býráð, har landsstýrið legði fram hugsanir um røktarheim í Vági, um ein skúladepil verður bygdur í Hovi, ið eisini skal fevna um miðnámsskúla.

Klokkan 19 fríggjakvøldið handaðu stigtakararnir borgarstjóranum í Vági, Jógvani Krosslá, tær 507 undirskriftirnar. Ingibjørg Thomsen úr Sandvík, og Sunniva Mortensen av Tvøroyri, siga, at tað eru ikki bert fólk úr norðara partinum í Suðuroynni, ið hava skrivað undir, men eisini úr t.d. Vági og Sumba.

Tær báðar tóku stig til innsavningina og kundu fríggjakvøldið handa borgarstjóranum heilar 507 undirskriftir.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri, takkaði teimum báðum, men hansara viðmerking er annars, at tá Vágs Býráð á fundinum við landsstýrið havnaði hugsanunum um røktarheim í staðin fyri miðnámsskúla, so var hetta ein einmælt avgerð. Og undirskriftirnar tekur býráðið til eftirtektar, men hetta broytir ikki støðutakanina hjá Býránum.

Umframt Vágs Býráð, hava tær báðar eisini sent løgmanni og løgtingsmonnunum Hendrik Old og Johan Dahl, undirskriftirnar

### Savna fleiri undirskriftir

Síðani undirkrisftirnar vórðu handaðar, hava tær báðar gjørt av at halda fram við innsavningini.

Tær siga, at tær hava fingið so nógvar áheitanir frá fólki, sum onkusvegna ikki hava fingið høvið til at skriva undir, at tær nú fara at taka innsavningina uppaftur.

Adressan hevur fyri tað mesta ligið í ymsum handlum og tað hevur gjørt, at tað eru mong, sum ikki hava havt høvi til at skriva undir.

Tær siga, at áheitanirnar, tær hava fingið, vísa, at tað er rættiliga nógv fólk afturat, sum kundu hugsað sær at skriva undir og tey halda tað er rætt at tey eisini fáa møguleikan.

Sostatt fara tey nú at ganga hús úr húsi í ymsum bygdum í Suðuroy fyri at geva fólki høvi til at skriva undir.




Vika 39, 2004
www.kaupthing.fo

# Rentuhækkingar í andgletti

MARKNAÐARRÁK

Ein lækking í amerikanska árliga prísvøkstrinum, ódnin Ivan og eitt vánaligt ídnaðarálit í Philadelphia fingu donsku lánsbrævarenturnar at lækka, so tær stundum, í farnu viku, vóru á lægsta stigi síðan apríl mánaða. Rentan á danska 10 ára statslánsbrævinum liggur í dag á 4,36% sum er 0,05%- stig lægri enn fyri viku síðan. Partabrøvini ávirkaðust hinvegin ikki stórvegis av hendingunum og liggja í dag á leið á sama stigi sum fyri viku síðan.

Týdningamesta hendingin í farnu viku varð kunngerðin um prístalsvøksturin í USA. Hóast ein væntaðan árligan prístalsvøkstur á 2,8% gjørdist hesin 2,7%. Tann lági prísvøksturin í USA staðfestir, at hóast høgan oljuprís, hevur hesin ikki ávirkað prísvøksturin avgerðandi.

Vánaligu tølini undan rentufundinum í amerikanska tjóðbankanum ídag, fara neyvan at ávirka avgerðina hjá teimum um at hækka leiðandi rentuna í 1,75%. Prísvakstrargongdin ger, at marknaðurin metir størri sannlíkindi vera fyri, at tjóðbankin kann fara at tálma rentuhækkingini í tíðini sum kemur, tí einki bendir á, at prísvøksturin leggur trýst á amerikanska búskapin og harvið skundar undir rentuhækkingar í úrtíð. Hóast útlitunum fyri einum hægri árligum prísvøkstri í Týsklandi, lækkaðu evropisku og donsku lánsbrævarenturnar, tí hesar eru neyvt tengdar at tí amerikansku.

Hesa vikuna koma ikki nógv lyklatøl úr USA, so marknaðirnir fara serliga at leggja seg eftir, hvat tjóðbankin, á rentufundinum, sigur um ferðina á rentuhækkingunum. Verða tekin um, at ferðin kann verða sett niður, vil hetta fáa renturnar og dollaran at lækka.

Kaupthing metir framvegis, at lánsbrævarenturnar fara at hækka komandi tíðina, men oljuprísurin og amerikonsk prísvakstrartøl fara framvegis at ávirka marknaðirnar. Yvirgangsatsóknir vilja tó framhaldandi elva til óvissu og kunnu sostatt ávirka gongdina á virðisbrævamarknaðunum.

Um tríggjar vikur byrja roknskaparkunngerðirnar fyri 3. ársfjórðing. Útlit eru fyri góðum roknskapum og kunnu hesir fáa partbrøv at hækka.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,59% | -0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,54% | -0,05% |
| 10 ára lánsbræv | 4,36% | -0,05% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 275,5 | -0,4% |
| OMX, Svøríki | 700,2 | -0,3% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.780,3 | 0,0% |
| S&P 500, USA | 1.128,6 | 0,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,20 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 167,23 | 0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 81,62 | 1,1% |
| Altjóða Vøkstur | 60,55 | 1,1% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 612,03 | 0,9% |
| EUR | 743,43 | -0,1% |
| GBP | 1.093,58 | 0,4% |
| NOK | 88,42 | -0,7% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*






*– Eg vænti, at Fiskamarknaður Føroya koyrir sum higartil – og so verður neyvan nøkur broyting beint fyri stavn, sigur Egil Olsen, formaður í Ráfiskakeyparafelagnum*

# Nýggja uppboðssølan fyri bakka

**Mang bendir nú á, at nýggja uppboðssølan, sum Ráfiskakeyparar og Ráfiskaseljarar ætlandi skuldu stovna saman við Fiskamarknaði Føroya, fyribils er farin fyri bakka**

UPPBOÐSSØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at stovnað eitt nýtt uppboðssølufelag, sum Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið skuldu eiga helvtina av, meðan Fiskamarknaður Føroya skuldi eiga hina helvtina.

Í hesum sambandi hevur nevndin í Fiskamarknaði Føroya samtykt at býta fyritøkuna uppí tvey, soleiðis landingarparturin verður ein og søluparturin ein annar.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, sum seinastu árini hevur verið nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya, hevur sambært grein á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum stuðlað tilgongdini við einari nýggjari uppboðssølu av fullum huga.

Føroya Fiskimannafelag telist millum parteigararnar av Fiskamarknaðinum.



*Egil Olsen er ógvuliga harmur um, at Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið ikki náddu á mál við eini nýggjari uppboðssølu, nú feløgini vóru komin so langt og semja vísti seg at vera um meginreglurnar*

### Bakkaði út

Egil Olsen, formaður í Ráfiskakeyparafelagnum, sigur, at orsøkin til, at keyparar og seljarar ikki vunnu undir land á hesum sinni, var, at nevndin í Ráfiskaseljarafelagnum eftir ein fund herfyri boðaði frá, at meiriluti var ikki í felagnum fyri at taka undir við fyriliggjandi uppskoti um uppboðssølu.

- Vit fingu ongar aðrar grundgevingar enn, at Ráfiskaseljarafelagið hevði viðgjørt hetta á fundi, og at ein meiriluti í felagnum avgjørdi at bakka út. Eg veit tí ikki ítøkiliga, hví hetta endaði soleiðis. Sum formaður í Ráfiskakeyparafelagnum, helt eg eins og Árni Joensen, formaður í Ráfiskaseljarafelagnum, at stevið millum feløgini var gott. Nú seljarafelagið hevur vrakað uppskotið, ivist eg í, um teir, sum umboðaðu felagið í spurninginum um felags uppboðssølu, hava havt sítt bakland í lagi, tá ið teir samráddust.

Egil Olsen sigur, at Ráfiskaseljarafelagið fer at hava ein eykaaðalfund, har felagið fer at taka málið uppaftur.

- Eg eri ógvuliga harmur um, at vit ikki náddu á mál við eini nýggjari uppboðssølu, nú vit vóru komin so langt og semja vísti seg at vera um meginreglurnar.

### Støðan óbroytt

Spurdur, hvat nú hendir við Fiskamarknaði Føroya, um Ráfiskaseljarafelagið ikki broytir støðu og verður við í eini nýggjari uppboðssølu, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum:

– Tað dugi eg ikki at siga í løtuni, men eg vænti, at Fiskamarknaðurin koyrir sum higartil – og so verður neyvan nøkur broyting beint fyri stavn.

Egil Olsen sigur, at Ráfiskaseljarafelagið hevur ikki tosað endaliga um, hvat gerast skal, um støðan hjá Ráfiskaseljarafelagnum verður óbroytt.

– Nú bíða vit í fyrsta lagi eftir, at nýggjur fundur hevur verið í seljarafelagnum, sigur hann.

# Keyparar standa fast við semjuna

**Ráfiskakeyparafelagið hevur boðað Fiskimálaráðnum frá støðuni og gjørt greitt, at nú má politiski myndugleikin áseta neyðugar reglur í lógum og kunngerðum – reglur, ið hava sama endamál sum semjan, ið var gjørd millum Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið**

UPPBOÐSSØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum er grein um nýggju støðuna innan uppboðssølu í Føroyum.

Í greinini verður sagt, at arbeitt hevur verið við reglum sum áseta góðar og tryggar karmar fyri sølu og landing av ráfiski.

- Hetta arbeiði var í summar komið so langt áleiðis, at semja var um stovnan av uppboðssøluni. Viðvíkjandi reglum um sølu og landing av fiski var eisini semja um allar meginspurningar, og Fiskimálaráðið hevur fingið upprit við lýsing av hesum sendandi frá báðum pørtum.

Greinskrivarin harmast um ta vend, sum hetta málið fekk, tá ið ein meiriluti av seljarunum vrakaðu hesar ætlanir.

- Vit kunnu staðfesta, at viðurskiftini, sum nú eru galdandi á føroyska rávørumarknaðinum, virka ímóti, at fiskur verður meirvirkaður á føroyskum fiskavirkjum. Støðan er trupul hjá øllum fiskavirkjunum, nøgdirnar av óvirkaðum fiski, sum fer av landinum, eru støðugt vaksandi, og stóri taparin er í síðsta enda føroyska samfelagið.

Í greinini verður sagt, at Ráfiskakeyparafelagið hevur boðað Fiskimálaráðnum frá støðuni og gjørt greitt, at nú má politiski myndugleikin áseta neyðugar reglur í lógum og kunngerðum – reglur, sum hava sama endamál sum semjan, ið var gjørd millum feløgini.

Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag stendur sostatt fast við umrøddu semju við Ráfiskaseljarafelagið, sjálvt um fleiri virkir fara so langt sum at krevja landingarskyldu av øllum feskfiski.

Í greinini á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum verður sagt:

- Í stuttum kann sigast, at tað, sum felagið metir verða neyðugt er, at -

* allur feskur fiskur, sum verður veiddur og landaður, skal støddar- og góðskuskiljast
* allur fiskur, sum fer heilur av landinum, skal av loyvishavara seljast um góðkenda uppboðssølu í Føroyum, støddar- og góðskuskildur.
* skipan má gerast sum eisini umfatar djúpvatnstrolararnar, so hesi skip koma undir somu reglur fyri sølu og landing sum onnur

Ráfiskakeyparafelagið sigur seg at enda einki hava ímóti, at útlendingar keypa fisk á føroyskari uppboðssølu á jøvnum føti við føroyskar keyparar, treyta av omanfyri nevndu reglum.

## Árni, John og Óli

Sosialurin royndi í gjár at fáa viðmerkingar frá Árna Joensen, formanni í Ráfiskaseljarafelagnum, John Nielsen, stjóra á Fiskamarknaði Føroya og Óla Jacobsen, formanni í nevndini fyri Fiskamarknaði Føroya, men hetta eydnaðist ikki fyri evsta mark hja blaðnum.

Vit fara at venda aftur til spurningin um nýggju uppboðsøluna, sum tykist vera farin fyri bakka, í blaðnum í morgin.

**-v.**